Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Brúgvin um Fjarðará

Spurningar:

1. Er ætlanin at gera eina nýggja brúgv um Fjarðará í Skálafirði?
2. Hvussu nógv kann roknast við, at ein møgulig nýggj brúgv fer at kosta?
3. Hvørja ávirkan hevur tað fyri møguleikarnar at gera ein nýggjan veg omanfyri bygdina í Skálafirði, um nógvir pengar verða brúktir til ábøtur á verandi veg?

Viðmerkingar:
Landsverk hevur í nógv ár víst á, at nógvar brúgvar í Føroyum eru í ringum standi. Brúgvin um Fjarðará í Skálafirði hevur verið nevnd sum dømi um eina brúgv, sum er í sera ringum standi.

Nú ljóðar at brúgvin skal skiftast út, men samtíðis er ein onnur eldri ætlan um at gera nýggjan veg uttanum bygdina. Tann ætlanin hevur verið parkerað í nógv ár.

Hesin spurningurin verður settur fyri at vita, hvørja ávirkan tað kann hava á ætlanina um at gera ein nýggjan veg, um nógvir pengar verða brúktir til at bøta um verandi veg.

Á Løgtingi, 28. apríl 2026

Helgi Abrahamsen